Vikuskifti

Nr. 217 • fríggjadagur • 11. november 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo

**PETUR PÓLSON / KOMA**

Produsari: Bogi á Lakjuni við Eiler Hansen og Petur Pólson
Útgevari: Tutl
Ljóðbland: Óli Poulsen
Petur Pólson; sang, gittar, rhodes
Eiler Hansen; gittar, mandolin
Knút H. Eysturstein; ljómborð, rhodes, gittar
Bogi á Lakjuni; gittar, ljómborð
Niels Jákup í Jógvansstovu; Bass
Uni Árting: Trummur

# Myrk Debut

**Petur Pólson hevur útgivið eina frálíka útgávu, sum er merkt av myrkum og køldum sinnalagi. Fløgan er meistaraliga produserað, og eitt must hjá teimum, ið eru áhugað í føroyskum rokktónleiki**



**FLØGUUMMÆLI**
*Rókur Jákupsson Jakobsen*
*Rokur@sosialurin.fo*

**Minimalisma:**

Petur borðreiðir við eini kolsvartari debut. Huglagið á fløguni er kalt, myrkt, einsamalt og dapurt. Tónleikurin er einfaldur og kompositiónirnar eru gjøgnumgangandi grundaðar á nakrar fáar akkordir, sum eru á rundferð, og yvir hesar leggur Petur lítlar einfaldar melodiir. Hetta gevur Peturi rásarúm til at syngja, rappa og nynna sínar myrku yrkingar. Hetta - at tónleikurin er so einfaldur - gevur áhoyrarunum eina fatan av, at fløgan er sera stílrein. Kanska kann tað til tíðir gerast nakað keðiligt, tí løgini líkjast rættiligt nógv hvørjum øðrum - í øllum førum tær fyrstu ferðirnar eg hoyrdi fløguna.

Men tað gevur áhoyrarunum ein spenning at fylgja við teimum smáu varriatiónunum í melodiunum og akkordinum, so hetta (eg rópi tað) minimalistiska prinsippið riggar væl. Grundin til at tað riggar so væl, skal nokk eisini tillutast "the grand old man" Óla Poulsen. Hann hevur givið fløguni eina fyllu, sum eg rokni við, er altavgerandi fyri dygdina á fløguni.

Tað tykist sum er felagsnevnarin fyri tónleikin orðið "lítið". Fyri mær ljóðar tað, sum spæla allir tónleikararnir so lítið sum gjørligt, uttan tá ið okkurt veruliga skal henda. Hetta tykist smakfult og sterkt. Næstan øll løgini koma sníkjandi út ígjøgnum hátalararnar, og er hetta symptomatiskt fyri mátan, teir spæla uppá. Tónleikararnir spæla sera atmosferiskt og skapa ein intensan alheim til tónleikin; ein alheimur sum sprettir og blómar rundan um Petursa rødd.

**Sorgblídni og dramatiskar yrkingar**

Til tann sum ikki visti tað: Petur Pólson er ein framúrskarandi yrkjari. Hansara málburður er vakur og tungur. Tekstliga tykist tað sum um Petur yrkir nógv um at nerta ektaðar heitar kenslur; ein longsul eftir kærleika og nærleika. Tað svarta og tað hvíta. Líkasæla og viðkoma. Lív og deyði. Neyð og tryggleika. Mótsetningar verða stillaðir upp í yrkingum hansara, og hetta hóskar sera væl til dramatiska tónleikin.

Sostatt hevur Petur ein frálíkan platform til at leggja sína djúpu, karakteristisku og næstan teatralsku rødd útyvir kollagina. Ongin skal pástanda at Petur er ein sangari, sum til fulnar meistrar tann tekniska partin av fakinum. Helst er hetta er heldur ikki hansara ambitión. Hann leitar eftir einum listarligum máta at vísa sítt sinnalag, og tað klárar hann eisini sera væl. Hansara tónalag og sinnalag manifesterar, at hann hevur so heilt ótrúliga nógv uppá hjarta. Røddin vísir okkum, at Petur veruliga meinar tað sum hann sigur, og tað er eitt avgjørt pluss í tónleikaligi upplivingina av fløguni.

Tó haldi eg, at røddin onkuntíð gerst meiri fjákut enn dramatisk, tá ið Petur kroystur seg ov langt niður. Tá ið innlivingin og tulkingin verður skumpað til viks fyri at fáa tann djúpasta tónan at raka so nøkulunda, missir tað rættiliga fitt av trúvirði. Eitt nú haldi eg, at tað er lemjandi fyri annars so frálíka lagið "Ekkó", at Petur kroystir røddini niðurum sína sangbaru barrieru í versunum. Lagið Ekkó man annars verða ein heilsan til gamla meistarin Leohnard Cohen. Ekkó er samstundis eitt gott boð uppá eitt komandi hit á fløguni.

"Úr dýpinum" er eitt ófatiliga vakurt og væl produserað lag. Her hoyra vit nakrar fantastiskar ljóðsnildir í rappinum hjá Petur. Tað er rættiliga generelt fyri fløguna, at vit hoyra nógvar frálíkar ljóðkollagir, sum veruliga lyfta tónleikin upp á eitt stig, sum sjáldan verður rokkið við føroyskum útgávum. Tónleikurin, ja, fløgan, er eitt framúr gott handverk, sum Petur skal vera sera errin av.

"Eyma Sál" er ein undarlig samantvinnan av Petursa svarta huglagið og tí elligomlu føroysku sangtraditiónini. Kári Sverrisson syngur fagurt og inniligt við á lagnum, og eisini tílíkar gestaframførslur geva tónleikinum nøkur heilt onnur amboð, soleiðis at tú sum lurtari alla tíð situr spentur og bíðar eftir næsta leikinum.

**Røtur**

Fløgan er vøkur í síni tragisku tilveru. Tú situr alla tíð við eini kenslu av, at menniskjan er veik og ófullfíggja, tá ið tú livur teg inn í Petursa heim. Kuldin, neyðin, deyðin, longsulin tykist at liggja frammaliga í mínum huga, tá ið fløgan buldrar framvið.

Eisini er eitt stuttligt innslag við Símum úr Konoy lagnum "Timburmenn". Her syngja mætir menn sum Niels Arge Galán og Sámal Ravnsfjall saman við Petur. Hetta riggar stak, stak, stak væl, og er enn eitt boð uppá eitt komandi hit. Men vit mugu ikki gloyma Guðrið Hansen. Hon syngur m.a. við á lagnum Ekkó, og her hava vit eitt stórt talent. Guðrið hevur verið rættiliga nógv frammi í ár sum tónleikari, og tað er gleðiligt at hoyra, hvussu nógv hon hevur tikið seg fram seinasta árið.

Samanumtikið má sigast at fløgan er eitt "must" hjá teimum ið fylgja við føroyskum tónleiki. Tað skuldi verið ótrúligt um fløgan ikki gjørdist ein dundrandi succes, tí hon er millum tær heilt góðu fløgurnar sum eru komnar út tey seinnu árini.

Eg gleðist um at Petur aftur aktivt hevur blandað seg í tónleikalívið her heima, eftir at hann hevur verið í eksil í nøkur ár.